LM-091/2023

Føroya Kærustovnur

Fylgiskjal 10

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
110 Tórshavn
Postboks 377
Stílað: Høgni Iversen, fulltrúi, Hognil@umhvorvi.fo

Tórshavn, 15.02.2024
J.Nr.: 24/00804 (at tilskila í svari)
Viðgjørt: RDC/AH

Ummæli – uppskot til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt

Umhvørvismálaráðið hevur sent *Uppskot til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt* til Føroya Kærustovn til ummælis.

Viðmerkingar Føroya Kærustovns snúgva seg í høvuðsheitum um § 10 í uppskotinum, sum er ein heimildaráseting, har landsstýrisfólkinum verður heimilað at leggja kærumyndugleikan til Føroya Kærustovn.

Sambært serligu viðmerkingunum til § 10 í uppskotinum, er ætlanin: "*at Umhvørvismálaráðið er kærumyndugleiki tað fyrsta árið frá at lógin kemur í gildi, fyri síðani at taka upp samráðing við Føroya Kærustovn og Løgmálaráðið um at flyta kærumyndugleikan til Føroya kærustovn, um hetta gerst neyðugt.*"

Yvirskipað hevur Føroya Kærustovnur ongar viðmerkingar til, at heimildaráseting er í § 10, har landsstýrisfólkinum verður heimilað at leggja kærumyndugleikan til Føroya Kærustovn.

Sambært serligu viðmerkingunum til § 10, so eru ítøkiligar ætlanir um, at leggja kærumyndugleikan til Føroya Kærustovn eitt ár eftir, at lógin kemur í gildi. Talan er um heimild til, við kunngerð, at skipa viðurskiftini í samband við kærumyndugleika. Tilgongdin í samband við at lýsa kunngerðir, er sjálvandi øðrvísi enn, um talan er um at gera broyting í lóg, har tað vanliga er ein tilgongd við m.ø. hoyring av viðkomandi pørtum. Av tí at ein hoyring av viðkomandi pørtum ikki er vanlig, tá talan er um at skipa viðurskifti í kunngerð, loyvir Føroya Kærustovnur sær at koma viðmerkingum her, sum Føroya Kærustovnur metir vera viðkomandi, um landsstýrisfólkið nýtir heimild sína í § 10, at leggja kærumyndugleikan til Føroya Kærustovn.

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at royndir hjá Føroya Kærustovni vísa, at tá nýggj økir vera løgd til Føroya Kærustovn, so er av alstórum týdningi, at Føroya Kærustovnur og avvarðandi aðalráð eru ein virkin partur í sjálvari tilgongdini. Hetta soleiðis, at tryggjast kann, at øll viðkomandi viðurskifti vera lýst til fulnar, og at øll neyðug atlit vera tikin.

Føroya Kærustovnur

Tað er av stórum týdningi, at tilgongdin fer fram í tøttum samráði við Føroya Kærustovn og avvarðandi aðalráð, soleiðis at tryggjast kann, at flytingin av kærumyndugleikanum er væl umhugsað og fyrireikað, og eisini soleiðis at tryggjað verður, at neyðug arbeiðsorka og fígging er til taks.

Tað er eisini týdningarmikið, at Føroya Kærustovnur er partur av tilgongdini, soleiðis at tryggjast kann, at viðurskiftini í samband við til dømis kæruatgongd, kærugongd, kæruevni o.s.fr. eru væl umhugsað, vera lýst til fulnar og eru púra greið. Hetta er alneyðugt, soleiðis at tryggjað verður, at flytingin av kærumyndugleikanum verður so ómakaleys og væleydnað sum gjørligt.

Føroya Kærustovnur hevur ikki fleiri viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt í hesum umfarinum.

Vinarliga

Anja Hovgaard
stjóri